# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Joan vann í Lissabon

**Joan Bláfoss vann um vikuskiftið altjóða triathlon-kapping á hálvum ironman-teini**

TRIATHLON
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í hálvum ironman skulu íðkararnir fyrst svimja 1,9 km. Síðani verða 90 km súkklaðir, áðrenn endað verður við hálvum marathon – 21 km.

Joan nýtti 4 tímar, 8 minuttir og 24 sekund um drúgva teinin, og hetta var skjótari, enn nøkur onnur kvinna í kappingini megnaði.

Joan, ið til dagliga venur og býr í Keypmannhavn, hevur íðka triathlon síðani 2002, og hevur serliga tey bæði seinastu árini hækkað støðið hjá sær munandi. Triathlon er ein sera tíðarkrevjandi ítróttur, har tað krevst einar 20-30 tímar av venjing um vikuna.

- Tá ið vit byrjaðu við svimjingini merkti eg, at hetta kundi blíva ein góður dagur. Tað føldist sera gott, og tá eg kom upp úr vatninum sá eg, at eg hevði svomið væl skjótari enn eg fyrr havi gjørt. Súkklingin gekk eisini væl hóast tað var eitt sindur ringt at finna eina góða rútmu. Á veg út á renningina legði eg meg á eitt triðjapláss, og longu á øðrum út av fýra umgangum av renningini hevði eg runnið meg upp á fyrsta plássið. Beinini føldust góð, so føringin skuldi "bara" haldast í mál, segði Joan eftir kappingina.

- Tað er ringt at seta orð á eitt sovorðið upplivilsi. Mín dreymur hevur verið at vunnið eina altjóða kapping, men at tað skuldi eydnast longu nú hevði eg ikki væntað. Eg havi arbeitt hart ímóti tí og arbeiði hart víðari, so tað ikki verður fyrsta og seinasta kappingin eg vinni, leggur hon afturat.



*Joan Bláfoss hevði alla orsøk at fegnast, tá hon gjørdist fremsta kvinnan í knallharðari triathlon-kapping í Lissabon*

# Christian fer úr Manchester

**Ríkiliga nógv av skaðum hava helst gjørt sítt til, at sáttmálin ikki verður longdur. Men tað er einki, sum bendir á, at evnaríki miðvallaleikarin vendir aftur til heimligu kappingina fyri tað**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur hann verið mettir sum ein tann evnaríkasti føroyski fótbóltsspælarin. At Manchester City úr ensku Premier League valdi at gera sáttmála við Christian Restorff Mouritsen borgar eisini fyri góðsku, men alt bendir á at eftir summarsteðgin verður tað ikki í tí felagnum, at Christian fer at spæla fótbólt.

### Skiftir felag

Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá Christiani, váttar, at talan verður ikki um nýggjan sáttmála við Manchester City.

- Tað eru ivaleyst fleiri orsøkir til hetta. Tá hann hevur spælt, hevur Christian staðið seg væl. Men hann hevur átt sín stóra lut í skaðum, og kappingin um plássini hevur verið hørð. Á eykaliðnum hava teir fýra miðvallaleikarar, og tveir teirra hava verið sera støðugir alt árið, og tí hava mongu skaðarnir hjá Christiani helst kosta í so máta.

Enn veit Jákup í Stórustovu ikki, hvar Christian Restorff Mouritsen fer at spæla fótbólt eftir summarsteðgin, men tað tykist sera sannlíkt, at talan framvegis verður um útlendskt felag.

- Tað er eingin, sum ivast í evnum hansara, og enn er Christian bara 19 ára gamal. Tá transfer vindeygað letur upp í summar, verður tað opið fram til 31. august, og innan ta tíð hava vit greitt framtíðina hjá honum. At skifta felag er jú sum so ikki nakað óvanligt, tá tú ert yrkisspælari, sigur Jákup í Stórustovu.

Enn hevur Christian Restorff Mouritsen ikki spælt á føroyska A-landsliðnum í undankappingardysti. Men á U21-liðnum hevur hann gjørt vart við evni síni. Eitt nú í Italia. Tá hevði Christian annars júst verið skaddur, men hann var á vøllinum seinastu løtuna av tepra 2-1 tapinum, og tá frættist úr landsliðsleguni,at hann tá tók fleiri av italsku eygleiðarunum á bóli. Men um tað verður í Italia ella aðra staðni, at hann fer at royna fótbóltseydnuna, er tó ikki víst enn.

# ÍF kærir dómaran

**Í Fuglafirði eru tey somikið ónøgd um dømingina í Runavík, at tey hava sent kæru inn til FSF**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í triðja hálvleiki á Rás2 vóru orðini, sum spælararnir høvdu at bera dómaranum, alt annað enn vøkur.

Serliga ilskaðust fuglfirðingar um, at teir mettu bæði brotsspørkini hjá NSÍ sum bílig, eins og teir hildu Óla Hansen vera rangstaddan, tá hann skoraði triðja málið.

Eitt er, at hesir dómar bóru við sær, at ÍF ikki vann stig í dystinum. Annað er, at tveir fuglfirðingar sóu reytt í dystinum, og tí standa til at fáa leikbann til dystin móti B71 komandi umfarið.

Og mest sannlíkt er tað hetta, sum hevur fingið leiðsluna í ÍF at reagera.

- Gera vit einki, so hendir so slettis einki. Vit vóna sjálvandi, at FSF ásetur nýggjan dyst, men undir øllum umstøðum vilja vit hava, at leikbannini hjá Alexndar Jovevic og Balazs Sinko verða strikað, sigur Dan Petersen, formaður í ÍF.

Hann vil ikki nágreiniliga siga, hvat annað stendur í kæruni, men tað er greitt, at tey í felagnum meta, at dómaravrikið mikukvøldið var undir lágmark. Men nú er kæran so send FSF, og so vóna fuglfirðingar, at kæran verður viðgjørd alt fyri eitt.